# Minningargrunnur

## Dánjal Niclasen’s

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2006 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen's eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin, hin 10. august 2006.

Umsóknarblað fæst við at fara á heimasíðuna www.faroe.com ella heimasíðuna www.united.fo ella seta seg í samband við Faroe Seafood, tel. 35 55 55. Umsóknarblaðið skal sendast til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen’s:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen's**
**c/o Faroe Seafood**
**Postboks 68**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Meinhard Jacobsen, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær **víðari útbúgving** innanfyri føroyska fiskivinnu. Í 2006 verða umsóknir um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen’s raðfestar á henda hátt:*

- *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*
- *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
- *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
- *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*

Sosialurin 341800



# Leyst starv

### Skrivstovufólk til Tórshavnar kommunuskúla

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Tórshavnar Kommunuskúla.

**Arbeiðið umfatar**
Vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

**Førleikaprógv**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, vera teldukønur, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og viðskiftafólk.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er parttíðarstarv og verður sett 1. sep. 2006. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hanus Joensen, skúlastjóra, tlf. 302580, ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 302010.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. august 2006.

**Lesið meira um størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

## Ruskinnsavnari til ”Ryska” IRF

**Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til innsavningarbilin ”Ryska” at byrja skjótast tilber.**

**Arbeiðið umfatar:**
I. Innsavnan av húsarhaldsposum og virkisposum
II. Annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjaran:**
I. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil.
II. Kunna arbeiða sjálvstøðugt
III. Fyrikomandi og høviskur
IV. Álítandi
V. Kundavinarligur

**Galdandi sáttmáli:**
Fastlønarsáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan mikudagin 9. august 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 473300, Adelbert Ellingsgaard.

IRF
Postboks 39
520 Leirvík

*IRF hevur 5 serútgjørdar bilar til ruskinnsavning: Roði, Ryski, Rósa, Reyðsmæra og Viól.*
*Arbeiðsumráðið hjá ”Ryska” er Norðoyggjar, Vágar, Norðstreymoy og Eysturoy. Tríggir mans eru við ”Roða”.*

# NÁTTARBUSSUR

## á Summar Festivalinum

**Eftir tiltøkini fríggjakvøldið og leygarkvøldið koyra náttarbussar til Havnar og Vestmanna.**

**Bussarnir koyra frá parkeringsplássinum við KÍ-høllina**

**Fríggjakvøldið ........04.15**

**Leygarkvøldið ........04.15**

